

## Globala útboðið av alilaksi minni í 2009 enn í 2008

Í 2009 er nøgdin av laksi, tikin í øllum heiminum, 2% minni enn í 2008. Tað vísir ein uppgerð, sum Kontali Analyse hevur latið gjørt. Vinnuhúsið skrivar í morgun á heimasíðuni, at í 2008 var samlaða nøgdin av laksi 1.493.400 tons. Í 2009 var nøgdin 1.460.500 tons ella 2% minni enn í 2008. Orsøkin er serliga at finna í Kili, har framleiðslan av laksi er minkað við 42%. Norra, sum er heimsins størsti framleiðari av laksi, hevur økt sína framleiðslu í 2009 við 15% og er komin uppá 855.300 tons av laksi í 2009.

# Eivør sang saman við Nephew

**Fríggjakvøldið var Eivør á palli saman við danska bólkinum Nephew, sum framførdi á P3 Guld 2010, ið varð víst beinleiðis á DR2**



Talan var um eina serstakliga góða framførslu frá rokkbólkinum, sum fyrr um kvøldið ógvuliga hóskandi hevði fingið P3 Live heiðurslønina.

Nephew spældi sangin Police Bells and Church Sirens, og Eivør trein á pallin og gjørdist partur av framførsluni, tá sangurin var hálvrunnin. Eivør, sum sang á føroyskum, gav við síni sermerktu rødd sanginum eina heilt aðra dimensión.

Hetta vísti seg eisini at rigga serstakliga væl, og framførslan hevur eisini vakt ans í donskum fjølmiðlum.

Heimasíðan musikbase.dk, ið er ein tónleikaheimasíða við tíðindum og ummælum, gevur framførsluni sera góð skotsmál.

- Det gav en fremragende ekstra dimension til nummeret, og vi formoder, at de fleste i salen og hjemme i stuerne fik kuldegysninger, da hun trådte ind på scenen og fyrede den maksimalt af, skrivar musikbase.dk um ískoyti hjá Eivør til framførsluna hjá Nephew.

Til ber at síggja og hoyra framførsluna hjá Nephew og Eivør á: http://www.youtube.com/watch?v=0GJC5bIX6Zs&feature=player_embedded



# Sement á høgum støði

**Støðið var ógvuliga høgt, næstan ov høgt, sigur Niels Arge Galán, ein av dómarunum til Sement 2010.**



Leygarkvøldið var fyrsta innleiðandi umfar av tónleikakappingini Sement 2010, og sjey bólkar royndi seg í kappingini, har tríggir vóru útvaldir til at verða við í finaluni, sum verður 30. Januar.

Teir tríggir dómararnir Niels Arge Galán, Lena Andersen og Terji Rasmussen hava øll trý nógvar royndir innan føroyska tónleikaheimin, men tað var als eingin løtt uppgáva at loysa leygarkvøldið, tá ið tríggir bólkar skuldu veljast burturúr mongdini.

- Støðið var ógvuliga høgt. Havi næstan hug at siga ov høgt. Onkuntíð fær man beinanvegin eina fatan av hvør skal víðari til finaluna, men tað var sera trupult hetta kvøldið, sigur Niels Arge Galán.

Tað er neyvan nøkur loyna, at føroyingar eru eitt tónlistarligt fólkaslag, og vit eiga ógvuliga nógvar góðar tónleikarar.

Eisini teir nýggju bólkarnir eru at kalla á høgum støðið, og duga millum annað væl, at bera seg fram á palli.

- Støðið var so høgt, at tað vóru fleiri bólkar enn teir tríggir, sum áttu at sloppið víðari til finaluna. Eg trúgvi eisini, at fleiri eru ósamd við okkara val, sigur Niels Arge Galán.

Síðani Prix Føroyar var tikið av skránni hjá Norðurlandahúsinum, hevur tað ikki verið nøkur stór kapping, har ungir og óroyndir tónleikarar fáa møguleikan at royna seg. Men Niels Arge Galán heldur, at Sement hevur stóran týdning fyri teir nýggju tónleikararnir.

- Sement gevur nýggjum bólkum, og fólki, sum hava áhuga fyri nýggjum tónleiki ein stóran møguleika. Har vóru nógvir bólkar, sum eg als ikki kendist við áðrenn, sigur Niels Arge Galán.

Niels Arge Galán hevur verið eitt kent andlit á føroyska tónleikapallinum í nógv ár, og eisini hann var bergtikin av teimum ungu tónleikarunum.

- Um eg samanberi hetta við fyrstu ferð eg spældi LIVE, so dugdu hesir bólkarnir munandi betri enn eg, sigur Niels Arge Galán.